

atlantic.fo | kall.fo | mmr.fo | gransking.fo | tunnil.fo | biblian.fo | sandavagur.fo | studul.fo | barsil.fo

Rósa Samuelsen, borgarstjóri í Sandavági

"Heimasíðan frá Sansum fremur opinleikan í Sandavágs kommunu"

Heimasíðan frá Sansum er vorðin eitt ógviliga hent amboð hjá okkum. Við heimasíðuni, ið er grundað á serliga heimasíðuskipan til føroyskar kommunur, kunnu vit bjóða borgarum og øðrum áhugaðum dagførda kunning um kommununa og virksemið í Sandavági.

Ein týdningarmikil partur av okkara heimasíðu er ein fundarmodulur, sum er gjørdur við kommunustýrislógini í huga. Hesin fundarmodulur fremur kunning og opinleika í kommununi. Nú kunnu øll siggja úrrit úr fundarskránni, gerðabókini og siggja avgerðirnar í málum, sum hava verið fyri almennum kommunustýrisfundi.

Fyri okkum er tað eisini sera týdningarmikið, at heimasíðuskipanin er lótt at brúka. Tað er til dømis sera lætt at taka út og seta inn myndir og tekst á heimasíðuna.

SANSIR

Tinghúsvegur 47 | Tel 355 355 | Faks 355 350 | www.sansir.fo | info@sansir.fo




# Foreldrini velja yrkisleiðina



*Fólk velja ofta útbúgving og yrkisleið eftir, hvat foreldrini gera, segði norski rektarin Randi Øverland, tá útbúgvingarstevnan varð sett í Norðurlandahúsinum fríggjamorgunin*

**Tey ungu velja ofta, meira ella minni tilvitað, somu útbúgving og yrkisleið, sum foreldrini, segði norski studentaskúlarektarin Randi Øverland, tá lestrarráðstevnan varð sett í Norðurlandahúsinum fríggjamorgunin**

LESTRARSTEVNA
*Edvard Joensen*

Tað ber væl til at byrja útbúgvingina lokalt og síðan flyta seg út í heim fyri at víðka ta útbúgving, ein er byrjaður upp á heima, segði norski rektarin Randi Øverland, tá lestrarstevnan varð sett í Norðurlandahúsinum fríggjamorgunin.

Annita á Fríðriksmørk, landssýrismaður við mentamálum, segði, tá hon setti stevnuna, at ein slík stevna hevur til endamáls at menna áhugan fyri øllum teimum tilboðum, sum finnast eftir lokna miðnámsútbúgving.

– Vit hava nógvar møguleikar at víðka sjónarringin, og vit eiga at taka tær avbjóðingar upp, sum eitt nú internetið gevur til altjóða útbúgvingar.

Eftir at Annita á Fríðriksmørk hevði sett stevnuna, fekk Randi Øverland orðið.

Hon legði dent á at lýsa, hví tað var so umráðandi at taka eina útbúgving, og helst skuldi tað vera ein, sum vildi nakað.

– Tað er í einum samfelag, sum er í slíkari menning, sum tað vit kenna í dag, at fólk hava útbúgvingar, sum klára tær avbjóðingar, sum eru. Fólk, sum onga útbúgving hava, eru meira í vanda fyri at detta burturímillum, enn tey, sum taka útbúgving. Hon er stutt sagt neyðugt í dagsins samfelag, segði hon.

Hóast foreldrini eru rættiliga frammalaga, tá fólk verða ávirkað til at velja útbúgving, hava vinirnir eisini nakað væl at siga. Men tað kann ongantíð sigast nóg ofta, at tað er umráðandi at taka støðu sjálvur og royna at bróta tað mynstrið, sum verið hevur.

– Veljið sjálv og latið tykkum ikki ávirka av gomlum vanum og avgerðum, men standa á egnum beinum.

Randi Øverland kom eisini inn á eitt evni, sum føroyingum tykist viðkomandi. Nevniliga útbúgving í fiskivinnuni.

Fyri tíggju árum síðan snerktu nógv at, at norskir studentaskúlar fóru at bjóða útbúgvingartilboð í fiskivinnu. Men í dag hava teir ásannað, at uttan væl útbúgvið fólk í vinnuni, hevði Noreg bara endað sum ein rávøruframleiðari, og tað ynskja norðmenn ikki, segði hon.





